LM-048/2020

Fylgiskjal 2

Fíggjarmálaráðið

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn 21. august 2020
J.nr.: 20/00345
Tygara j.nr.: 20/00545
Viðgjørt: SF

Hoyringarsvar

Fíggjarmálaráðið hevur fingið til hoyringar "Uppskot til broytingar í barnaverndarlóg v.m"

Ætlanin er at seta nýtt stk. 8 í § 22, soljóðandi: "Barnaverndartænastan ber ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru, um foreldrini ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðslur."

Tað er skilagott, at heimildin til at endurrinda ferðaútreiðslur verður fingin til vega.

Viðvíkjandi tí, um foreldrini **megna**, verður í viðmerkingunum sagt soleiðis: "Ætlanin er tí, at tað í Leiðbeining nr. 8000 frá 19. februar 2020 verður nágreinað, hvussu barnaverndartænasturnar skulu gera eina tørvsmeting ..." Her verður soleiðis tikið hond um tann spurningin.

Ætlanin er at seta nýtt stk. 5 í § 29, soljóðandi: "Veitingar sambært lógini verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar."

Tað er ikki nágreinað, **hvørjar** veitingar skulu javnast soleiðis. Tað er neyvan ætlanin, at høvuðsbarnaverndarnevndarsamsýningin nevnd í § 12, stk. 5 skal javnast sum almannaveitingarnar. Er tað púra greitt, at ein samsýning er ikki ein veiting, er tó eingin trupulleiki.
At eingin ivi skal vera, kundi verið sagt: "Veitingar sambært **§ 29** verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar."

Í kunngerð nr. 69 frá 2006 er ætlanin at hækka lummapeningin. Fíggjarmálaráðið hevur ikki nakra avgjørda meining um hesar upphæddir.

Í somu kunngerð er ætlanin at lata § 2, stk. 2 vera soljóðandi: "Landsstýrismaðurin kunngerð javnaðu gjøldini í rundskrivi í seinasta lagi 1. januar á hvørjum ári." Tað er eitt gott hugskot, tí í verandi orðing: "Landsstýrismaðurin ásetir javnaðu gjøldini í kunngerð um áseting og javning av almannaveitingum, í seinasta lagi 1. januar á hvørjum ári" sýnast tvær kunngerðir at vera í spæl samstundis.
Orðingin skuldi kanska heldur verið: "... í seinasta lagi 31. desember á hvørjum ári til at koma í gildi 1. januar árið eftir." Tað er væl tað, sum er ætlanin?

Í kunngerð nr. 139 frá 2019 er ætlanin at taka burtur § 7 um samsýning til fosturforeldur. Tað er eitt gott hugskot, tí so verður ásetingin at finna í bara einum stað. Í dag eru hesar ásetingar at finna bæði í kunngerð nr. 69 frá 2006 og í kunngerð nr. 139 frá 2019, og her er ikki samsvar. Í kunngerð nr. 69, § 1 stk. 2 eru 3 ymiskar upphæddir, meðan í kunngerð nr. 139 § 7 stk. 2 – 5 eru 4 ymiskar upphæddir um tað sama.

Vinaliga

Snorri Fjallsbak

Tinganes • Postrúm 2039 • FO-100 Tórshavn
Telefon +298 35 20 20 • fmr@fmr.fo